# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 10/00111 | Lóg: Lóg um Toll- og Skattafyrisiting § 25a | Avgerð tikin: 17.12.2010 |
|---|---|---|

## Broyting av skattaálíkning – freist sambært § 25a- stk. 2 í lógini um toll- og skattafyrisiting. Samdøgursfrádrátt.


**Samandráttur:**

**Kært er um, at TAKS hevur sýtt at broyta skattaálíkning vísandi til freistina í § 25a, stk. 2 í lógini um toll- og skattafyrisiting.**
**Tað hevur í hesum sambandi ikki týdning, at kærarin var burturstaddur og ikki hevði møguleika at biðja TAKS um at broyta skattaálíkningina fyri 2005 innan freistina. Tað hevur heldur ikki týdning, at kærarin ikki hevur havt kunnleika til, at hann kundi fáa samdøgursfrádrátt fyri inntøkuárið 2005, fyrr enn TAKS upplýsti hann um hetta í sambandi við, at hann lat inn sjálvuppgávuna fyri 2008.**
**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tí avgjørt at staðfesta avgerðina hjá kommunalari skattakærunevnd.**


**Avgerð**

**Kært er um,** at TAKS hevur sýtt at broyta skattaálíkning vísandi til freistina í § 25a, stk. 2 í lógini um toll- og skattafyrisiting.

**TAKS**
Kærarin hevur kært avgerð hjá TAKS til kommunala skattakærunevnd, sum samtykti ikki at geva kæraranum viðhald í kæruni grundað á, at álíkningin fyri ár 2005 ikki kann broytast seinni enn 15. mars fjórða árið eftir, at inntøkuárið er lokið, tvs. í hesum føri 15. mars 2009. Søkt var um samdøgursfrádrátt 2. juni 2009, tvs. uml. tveir mdr. ov seint.

TAKS ger vart við, at freistin smb. § 25a, stk. 2 er úti seinast 3 ár eftir, at inntøkuárið er lokið, tvs. innan 31.12.2008.

Gongdin í málinum er hendan:
Tann 18.09.2006 sendir Told og Skat, Danmark eitt avrit av einum brævi, skrivað tann 04.08.2006, har upplýst verður, at kærarin hevur goldið 30% í skatti til Danmark ella DKK 24.598,38 fyri tíðarskeiðið apríl-juni 2005.

TAKS móttekur eina sjálvuppgávu fyri 2005 saman við skjølum frá kæraranum tann 22.08.2006, har hann upplýsir uttanlandainntøku og goldna skattin. Kærarin fær eina skattauppgerð sendandi tann 09.10.2006, har hann fær írestandi skatt uppá kr. 2.018,00. Tað er arb.marknaðareftirlønargjald fyri 2005.

Kærarin letur tann 02.06.2009 inn broytingarskjal til samdøgursfrádrátt, fríar ferðir o.a. fyri 2005, har hann upplýsir:

| | |
|---|---|
| Tíðarskeið | 73 dagar |
| Inntøka | kr. 77.962 |
| Goldin skattur | kr. 16.674 |
| Samdøgursfrádráttur | kr. 21.900 |

Í samband við innlatan av sjálvuppgávuni 2005 framgongur ikki, at kærarin hevur sett fyrispurning ella biðið um frádrátt. Tað fyriliggur tí einki um, at TAKS áður hevur noktað honum frádrátt.

TAKS hevur ikki gingið áheitanini á møti um at broyta álíkningina við teirri grundgeving, at málið er fyrnað.

Víst verður til § 25a, stk. 2 í lóg um toll- og skattafyrisiting.

Broytingin til álíkningina er móttikin tann 14.08.2009. Broytingar til sjálvuppgávu 2005 skulu sambært omanfyri nevndu grein verða lagdar fram í seinasta lagi innan 3 ár eftir, at inntøkuárið er lokið, tvs. innan 31.12.2008.

**Kommunala skattakærunevndin**
Skattakærunevndin hevur samtykt ikki at geva kæraranum viðhald grundað á, at álíkningin fyri ár 2005 kann ikki broytast seinni enn 15. mars fjórða árið eftir, at inntøkuárið er lokið, tvs. í hesum føri 15. mars 2009. Søkt varð um samdøgursfrádrátt 2. juni 2009, tvs. uml. 2 mðr. ov seint.

**Kærarin**
Kærarin førir m.a. fram, at hann ikki hevði møguleika at søkja um samdøgursfrádrátt fyrr, tí hann var burturstaddur uttanlands. Hann visti ikki um hendan frádrátt, fyrr enn hann lat sjálvuppgávuna inn fyri 2008, og í hesum sambandi bleiv upplýstur um frádráttin.

**Avgerð hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
Ynskir skattgjaldarin, at skattaálíkningin verður broytt, skal hesin seinast 3 ár eftir, at inntøkuárið er lokið, leggja fram nýggjar upplýsingar, sum kunnu grundgeva broytingina, jb. § 25a, stk. 2 í lóg um toll- og skattafyrisiting.

Kærarin hevur í brævi dagfest 2. juni 2009 søkt TAKS um samdøgursfrádrátt fyri inntøkuárið 2005. Kærarin hevur hervið biðið TAKS um at broyta skattaálíkning hansara fyri hetta árið.

Sambært § 25a, stk. 2 í lóg um toll- og skattafyrisiting er freistin at leggja fram nýggjar upplýsingar, sum kunnu grundgeva broyting av skattaálíkningini fyri inntøkuárið 2005, tann 31. desember 2008. Umbøn kærarans til TAKS um at broyta skattaálíkningina fyri 2005 er sostatt ov sein.

Tað hevur í hesum sambandi ikki týdning, at kærarin var burturstaddur og ikki hevði møguleika at biðja TAKS um at broyta skattaálíkningina fyri 2005 innan freistina. Tað hevur heldur ikki týdning, at kærarin ikki hevur havt kunnleika til, at hann kundi fáa samdøgursfrádrátt fyri inntøkuárið 2005, fyrr enn TAKS upplýsti hann um hetta í sambandi við, at hann lat inn sjálvuppgávuna fyri 2008.

**Grundað á omanfyri standandi hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørt at staðfesta avgerðina hjá kommunalari skattakærunevnd.**